# gott myndaland



*Marika Hill og Caroline Erichson t.v. hava verið í Føroyum í tríggjar vikur. Tvær tær síðstu vikurnar hava tær verið í starvsvenjing á Sosialinum. Her hava tað avmyndað hvørja aðra.*

Tað kemur tó fyri, at tey nerta við evnið í skúlunum. Caroline hevur vikuskiftisarbeiði á einum lokalum vertshúsi, og har er hon einasta kvinnan á arbeiðsplássinum.

- Eg fái góða viðferð av monnunum, eg skemti saman við teimum, og kenni meg slettis ikki uttanfyri, hóast eg eri kvinna.

Tað var fyrst í 1993, at kvinnur kundu fara í finska herin. Men er tað bara tvungin herskylda fyri menn í Finnlandi. Hjá kvinnunum er støðan tann, at tær gera av sjálvar, um tær melda seg í herin, og eru tær í herinum eitt væl styttri tíðarskeið, enn menninir, sum eru í minsta lagið 8 mánaðir í herinum. Hetta halda Marika og Caroline verða skeivt. Tær halda, at tað átti at verið soleiðis, at kvinnur og menn vóru innkallaði til finska herin á jøvnum føti. Tí javnstøða eigur at verða á øllum økjum. Hóast væl stendur til við kvinnuumboðan í landsins fremstu sessum, so hava tær ungu mammurnar tað torført í Finnlandi.

- Eg veit um tríggjar gentur í okkara aldri, sum eiga børn, og hava tær tað ofta torført, og verða tær baktalaðar. Ofta fara tær úr skúlanum, og enda úti í arbeiðsloysi, ella eisini mugu tær átaka sær okkurt keðiligt kvøldarbeiði, sigur Caroline, sum er hørm um lagnuna hjá teimum ungu mammunum í Finnlandi. Tær vísa tó á, at hesar fáa góðar sosialar veitingar frá bæði stati og kommunum. Men, at tað er hart hjá hesum at gera seg lidnar við eina útbúgving.

## Vasa Yrkesinstetut

Caroline og Marika ganga á Vasa Yrkesinstetut, sum bjóðar grundútbúgvingar innan ymisk øki fakøki, millum annað merkonom, teldu og heilsuatstøði. Caroline og Marika hava valt útbúgvingina "Medieasistent". Talan er um eina 3 ára grundútbúgving við nógvari praktiskari undirvísing, og nógvum praktiskum royndum, har enska máliskan "Learning by doing" verður nógv nýtt. Tær hava 6 vikurs starvsvenjing í hvørjum lestrarári, og hesaferð valdu tær so at hava part av starvsvenjingini í Føroyum. Lesandi úr øðrum londum eru eisini á Vasa Yrkesinstetut, serliga úr Svøríki, tí her er talan um eitt øki í Finnlandi, har mong svenskttalandi búgva. Men har eru eisini lesandi úr triðja londum, og tí fer undirvísing eisini fram á enskum innan ávísar greinar á Vasa Yrkesinstetut.

Finnland er fremst í PISA-kanningini, men Marika og Caroline hava ikki verið við til nakra PISA-roynd sjálvar. Eftir tí, sum eg kann fáa burturúr teimum, so fyllir PISA-kanningin ikki so nógv í Finnlandi, sum hon ger tað í Føroyum. Tá tær eru lidnar við sína grundútbúgving er ikki óhugsandi, at tær kanska leita sær longur út í heim at taka eina endaliga útbúgving. Marika ætlar at halda fast við myndaleistin, meðan Caroline hevur betri hug at royna seg innan loftmiðlarnar. Men fáa tær møguleikan verða tær aftur í Føroyum, antin við sjónvarpstóli, ella við myndatóli.